# VIÐMERKINGAR

SAMBAND
EIRIKUR LINDENSKOV
EIRIKUR@SOSIALURIN.FO
TLF 341800

## Nýggj byrjan ella byrjan til endan

Minnilutasamgongan hevur nú tryggjað sær parlamentariskt støði við tí semju, sum í gjár var gjørd millum landsstýrisflokkarnar og Sjálvstýrisflokkin, ið verður samstarvsflokkur hjá landstýrissamgonguni. Landsstýrið yvirlivir sostatt sum minnilutastjórn og so er spurningurin, hvønn politikk henda fyrsta minnilutastjórn fer at reka. Almenna fráboðanin gevur lítið ítøkiligt svar, men nakrar ábendingar eru og leggja vit hesar saman við teimum viðmerkingum, sum floksformenninir høvdu, fæst hóming av politikkinum.

Samgongan hevur fingið grønt ljós at at fremja tann politikk, sum er fastlagdur við CHE samgonguskjalinum. Hinvegin fevnir semjan ikki um tey samgongumál, sum longu eru farin á tingborð. Vandamálið í hesum bólki er fiskivinnupolitikkurin, har Sjálvstýrisflokkurin er ósamdur við samgonguna. Hetta mál kemur tó ikki at órógva samstarvið, tí stuðulsflokkurin her stendur fríur. Hvat, ið fer at henda við øðrum stórum málum, har semja ikki er, t.d. tunnilsmálið, er óvíst. Gerhard er heilt úti, og Páll var í tíðindasending sjónvarpsins so spakur, at hetta mál neyvan kemur til lívs aftur, fyrr enn vit nærkast vali. Sostatt er tunnilsmálið neyvan nakar parlamentariskur trupulleiki hjá minnilutastjórnini.

Aðrar áhugaverdar politiskar ábendingar eru í fráboðanini. Løgmaður tryggjar sær at kunna fara aðrar vegir í málum, har samstarvsflokkurin ikki er við, samstundis sum dyrnar standa opnar fyri hesum flokki at koma upp í samgonguna. Her verða eisini skitseraðar nakrar mannagongdir, ið skulu tryggja felags kós í heilt nýggjari politiskari støðu. Hetta merkir eitt nú, at løgtingsnevndirnar verða valdar av nýggjum og at Sjálvstýrisflokkurin kemur upp í samráðingarnar um fíggjarlógina 2009, og floksins ynski um stjórnarskipanarnevnd á tingi eftirlíkað. Flokkurin fær sostatt gott høvi at seta síni merki á politikkin hjá samgonguni. Sambært formann Sjálvstýrisfloksins verður dentur lagdur á bleytu virðini, vælferð, gransking, útbúgving og mentan. Sama søgdu allir flokkar í valstríðnum, men lítið sást eftirfylgjandi til hesi lyfti. Eydnast tað nú Sjálvstýrisflokkinum at fáa hesi mál á politisku dagsskránna, fer hetta at styrkja flokkin munandi.

Samantikið er nýggja politiska kontruktiónin ein áhugaverd politisk roynd, ið eigur at fáa ein møguleika. Avbjóðingar eru fyri framman, sum sambært stjórnargrundarlagnum fevna um stórar samfelagsbroytingar. Hetta merkir tungar avgerðir, ið koma at ávirka allar føroyingar. Tíðin fer at vísa, um konstruktiónin hevur styrkina til at bera henda politikk – hvørt talan er um eina nýggja byrjan, ella um byrjan til endan á sitandi minnilutasamgongu. Samstarvsflokkurin hevur í hesum føri stóra ábyrgd, men ábyrgdin er ikki Sjálvstýrisfloksins eina. Næstu mánaðirnar fæst at síggja, um Føroya fyrsta minnilutasamgonga er lívfør – útlitini eru ikki heilt av leið.

**Sosialurin**

## Minnilutastjórn – møguleiki ella misfostur

**JÓGVAN SUNDSTEIN**



Nú eru skjótt tvær vikur síðani, at løgmaður noyddist at ásanna, at hansara landstýri ikki longur hevði avgjørdan meiriluta í tinginum, tí Gerhard Lognberg kunngjørdi, at hann ikki longur var partur av parlamentariska grundarlagnum hjá landsstýrinum.

Samstundis var greitt, at løgmaður ikki hevði fingið nakran meiriluta ímóti sær, tí øll andstøðan segði frá, at hon ikki – í øllum førum í løtuni – vildi seta fram misálit á løgmann. Løgmaður hevði tí møguleika fyri at stýra víðari við eini minnilutastjórn, tað vil siga við sitandi landsstýri, Hendan møguleika hevur løgmaður ikki brúkt. Í staðin hevur hann brúkt tíðina – næstan 14 dagar – til at royna at útvega sær ein nýggjan avgjørdan meiriluta. Í skrivandi løtu sær út til, at nýtt samgonguskjal, sum teir rópa "samstarvsavtalu" er við at vera liðugt skrivað.

Framvegis verður støðan rópt ein "kulturbroyting" og nakað heilt nýtt í føroyskari politiskari søgu, tí nú skulu vit hava eina minnilutastjórn í Føroyum. Menn, sum taka soleiðis til orðanna, gloyma bara, at við mannagongdini seinastu tvær vikurnar verður ikki talan um eina minnilutastjórn, men um eina meirilutastjórn. Einasti munurin er, at tann eini flokkurin ikki hevur nakað landsstýrisumboð.

Um Jóannes Eidesgaard helt fram við eini minnilutastjórn, so kunngjørdi hann tað og bað ikki nakran av andstøðuflokkunum um serligan trygdareið, hvørki skrivliga ella munnliga. Hann skuldi bert sagt frá, at hann helt fram so leingi hann ikki hevði meiriluta ímóti sær, og landsstýrið arbeiddi víðari við teim málum, sum vóru á skránni eftir teim ætlanum, sum landsstýrið hevði. Uppskotini komu síðani í tingið, og har skuldu so landsstýrisumboðini søkja sær neyðturviligan meirluta fyri sínum politikki. Hetta skuldi gerast saman við tí ella teimum politisku flokkum, sum vóru mest positivir fyri loysn av viðkomandi máli. Okkurt mál vildi helst falli í tinginum, men løgmaður skuldi ikki tikið avleiðingarnar og fari frá, uttan so, at málið hevði stóran týdning ella, um viðurskiftini gjørdu, at tingið bleiv óarbeiðsført.

Í staðin er løgmaður komin í ta støðu, at hann er við at gera eina nýggja meirilutasamgongu við skrivligum ásetingum og undirskrivtum millum fýra flokkar heldur enn teim trimum, hann hevði frammanundan. Samstundis heldur hann hinar báðar stóru andstøðuflokkarnar uttanfyri, og so hava vit somu støðu sum frammanundan. Parlamentarisman og vanliga demokratiska ávirkanin er rokin. Eingin nýskapan er í eygsjón. Arbeiðast (og klandrast) skal víðari, nú við fýra flokkum og 18 tingmonnum, móti áður trimum flokkum og 17 tingmonnum, sum skulu semjast og garantera meirilutan, áðrenn nakað verður lagt fram.

Tað var løgmaður, sum skuldi víst, at hann tordi at taka avbjóðingina, men tað gjørdi hann ikki, og tí fær hann uppaftur størri trupulleikar við sínum nýggja formaliseraða meiriluta, enn hann hevði við tí gamla. At teir so eisini eru farnir at samráðast um tað tekniska og slíkt smáputl sum at endurvelja løgtingsnevndirnar vísir bara, hvussu stutt menn eru komnir.

## Parkeringspláss til rørslutarnað

**BERGLJOT AV SKARÐI OG HANS MARIUS JOHANNESSEN**

(sum brúka leiðina Gamlarætt-Skopun regluliga og gleða seg til Sandoyartunnilin)

**Opið bræv til Strandfaraskip landsins og Landsverk**

Tá ið tú sum rørslutarnað/ur fert við bilferju í Føroyum, mást tú stilla teg í bíðirøð sum hini, sjálvandi. Men, tá ið tú kemur umborð á Teistan sum nummar 10 ella 15, endar tú í tínum bili mitt á dekkinum millum hinar bilarnar og als ikki tætt hjá lyftuni. Nú ber helst als ikki til hjá tær at fara úr bilinum og í lyftuna og at taka koyristólin fram og trilla yvir til lyftuna.

Um tú nú ikki ert einsamøll/mallur, men hevur ein hjálpara í bilinum, kann hjálparin fara til manningina og biðja um loyvi til at koyra umborð, so at tað passar við, at tú sleppur at parkera við lyftuna, hetta ber til. Men hjálparin má so í øllum veðri passa seg upp at vera fyri manningini, tá teir byrja at koyra umborð at avráða hetta, og um tit standa í oysregni sum nummar 20 bilur, er hetta rættiliga óhent.

Tað er gott pláss bæði á Gomlurætt og á Skopunar kei at gera parkeringspláss til rørslutarnað, tað kostar bara eitt sindur av máling. Um hetta varð gjørt, so hevði manningin beinanvegin sæð, at her er bilur, sum skal standa á ávísum stað á dekkinum, nevniliga við lyftuna. Tað er bannað – og sera óhugaligt - at sita í bilinum, meðan siglt verður.

ST yvirlýsing um javnrættindi teirra brekaðu er samtykt í Føroyum.

**Sosialurin**

**Sosialurin**
Stovnaður: 1927
**Ábyrgdarblaðstjóri:** Jan Müller jan@sosialurin.fo
**Blaðstjóri:** Eirikur Lindenskov eirikur@sosialurin.fo
**Redaktiónsleiðari:** Kári Mikkelsen karim@sosialurin.fo

**Marknaðardeild:** lysing@sosialurin.fo
**Marknaðarleiðari:** Gudny Langgaard gudny@sosialurin.fo
Tróndur Skaalum trondur@sosialurin.fo
Høgni Thomsen hogni@sosialurin.fo
Henrietta Hammer henrietta@sosialurin.fo

**Blaðfólk:**
Áki Bertholdsen aki@sosialurin.fo
Vilmund Jacobsen vilmund@sosialurin.fo
Snorri Brend snorri@sosialurin.fo
Magnus Gunnarsson maggi@sosialurin.fo
Rigmor Dam rigmor@sosialurin.fo
Leo Poulsen leo@sosialurin.fo
Dorit Hansen dorit@sosialurin.fo
Eyðun Klakstein eydun@sosialurin.fo
Árni Joensen arni@sosialurin.fo
Anna V. Ellingsgaard anna@sosialurin.fo

**Ítróttur:**
Jákup Mørk jakup@sosialurin.fo

**Myndamenn:**
Álvur Haraldsen alvur@sosialurin.fo
Jens Kristian Vang jensk@sosialurin.fo

**Kykmyndir:**
Alvin Ellebye Andersen alvin@sosialurin.fo

**Sosialurin í Norðoyggjum:**
Nólsoyar Pálsgøta 1, 700 Klaksvík
tel. 458686 fax 458687
e-post: klaksvik@sosialurin.fo

**Sosialurin í Suðuroy:**
tel. 375364 fax 375464
tel. 228814
e-post: aki@sosialurin.fo
e-post: dagfinn@sosialurin.fo

**!!! Haldarar**
sum ikki hava fingið blaðið, kunnu ringja til 341818 frá kl. 8.00-20.00 og boða frá

**Uppseting/prent:**
Uppseting: Sosialurin
Prent: Prentmiðstøðin
**Útgevari:**
Sp/f Sosialurin
**Avgreiðsla:**
Mán.-frí. 8-16
Tórsgøta 1, 100 Tórshavn
Tel. 341800, Fax 341801
**Postadressa:**
Postboks 76, 110 Tórshavn
**E-mail:**
post@sosialurin.fo
lysing@sosialurin.fo
lysingartorg@sosialurin.fo
varp@sosialurin.fo

Blaðið verður prentað mánadag-fríggjadag klokkan 13[30]

**Lýsingar**

| Freistir: | Tekstlýsingar | Størri lýsingar | Lýsingartorgið | Heilsanir |
|---|---|---|---|---|
| Mánadagsblaðið | Mán.kl. 10 | Frí. kl. 15 | Frí. kl. 12 | Frí. kl. 12 |
| Týsdagsblaðið | Týs. kl. 10 | Mán. kl. 15 | Mán. kl. 12 | Mán. kl. 12 |
| Mikudagsblaðið | Mik. kl. 10 | Týs. kl. 15 | Týs. kl. 12 | Týs. kl. 12 |
| Hósdagsblaðið | Hós. kl. 10 | Mik. kl. 15 | Mik. kl. 12 | Mik. kl. 12 |
| Fríggjadagsblaðið | Frí. kl. 09 | Hós. kl. 15 | Hós. kl. 12 | Hós. kl. 12 |

Størri lýsingar, sum nógv arbeiði stendst av, mugu vera inni í góðari tíð og áðrenn ásettu freistir.
Framíhjápláss má umbiðjast í góðari tíð.

**Støðd:**
Ein heil síða í Sosialinum er 254 mm breið og 346 mm í hædd. Breiddin á einum teigi er 39 mm og rúmið millum teigarnar er 4 mm.

**Innsent tilfar**
Fult navn skal vera undir innsendum tilfari. Innsendar greinar, har blaðleiðslan ikki er kunnað um bústað og telefonnummar, verða ikki settar í blaðið.